# Biligari umhvørvis-vinarligir bilar

**Valflesk ella ikki; landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt fram fyrsta lógaruppskot, sum hevur til endamáls ítøkiliga at skerja CO2-útlát í Føroyum**

UMHVØRVI

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Fyri at sleppa av við gamlar og útslitnar bilar er ætlanin at hækka burturbeiningargjaldið, so kunnu verða tiknir úr føroysku bilparkini og burturbeindir á rættan hátt og harvið ikki koma at sløast í náttúruni*

*Savnsmynd*

Eftir lógaruppskotinum verða umhvørvisvinarligir bilar bíligari, og umhvørvisdálkandi dýrari. Ruddast skal upp í dálkandi partinum av føroysku bilparkini, heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Magni Laksáfoss.

Endamálið er, at innflutningurin av gomlum og dálkandi bilum skal steðgast, skrivar Fíggjarmálaráðið í tíðindaskrivi.

- Tí hækka vit nú burturbeiningargjaldið munandi, samstundis sum elstu akførini skulu gjalda hægstu umhvørvisgjøldini. Vit vóna soleiðis at fáa burtur gamlar og útslitnar bilar, sum koyra á føroysku vegunum ella liggja og sløðast í føroysku náttúruni, sigur Magni Laksáfoss.

Leisturin sum nýggja lógaruppskotið er skorið eftir er europeiskur. ES-nevndin mælir til eina stigvísa harmonisering av bilavgjøldunum, so ES-londini frá 1. desember 2008 hava lagt 20 prosent av bilavgjøldunum um til CO2-avgjøld. Síðani skal CO2-avgjaldsparturin hækka stigvíst næstu árini.

Í uppskotinum verður verandi eykaskrásetingargjaldið á 25 prosent strikað og lagt um til CO2-avgjald.

20 prosent av virðisgrundaða skrásetingargjaldinum í galdandi lóg verður sostatt lagt um til CO2-avgjald í hesum lógaruppskotinum.

- At minka CO2, sum er eitt veðurlagsgass, er eisini samsvarandi endamálinum við ST-veðurlagssáttmálanum, sum Føroyar hava bundið seg til at fylgja, og eisini Kyoto-sáttmálanum, sigur Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, í tíðindaskrivi.


## Útbering av dagbløðum og reklamum



**LEYST STARV**

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út í **Søldarfirði**

Ert tú 13 ár ella eldri, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 35 14 05** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost: **utbering@prent.fo**

**Prentmiðstøðin**

Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 34 14 00 · Útbering tel 35 14 05 · Fax 35 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo





## SØKT VERÐUR EFTIR SKRIVSTOVUFÓLKI TIL SMS

Søkt verður eftir fólki til skrivstovu okkara. Arbeiðið fevnir m.a. um alt vanligt skrivstovuarbeiði. Kassauppgerðir, avstemman, skuldara- og ognarabókhald. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði, dugir at arbeiða við teldu, kann arbeiða sjálvstøðugt og ikki er bangin fyri at taka hond í har ástendur. Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast tilber.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mary Husgaard, skrivstovuleiðara, telefon 31 30 41 ella teldupost mary@sms.fo.
Hevur hetta áhuga, so send okkum eina umsókn saman við uppýsingum um møguligar royndir v.m.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3.desember.

SMS Skrivstovan · Postboks 1059 · 110 Tórshavn

**SMS**

Dogg

